NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

FØÐINGAR

Tann 4. juni fekk Annika Østerø úr Klaksvík eina fitta lítlasystur. Hon eitur Bjørg, og hon var 51 cm long og vigaði 3970 g. Foreldrini eru Joan og Árni Østerø

11. juni fingu Annika í Dímun og Freddie Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3350 gr.

14. juni fingu Marianna og Jógvan Johannesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3600 gr.

16. juni fingu Heidi og Bogi Olsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

18. juni fingu Joan og Jan Skoralíð, Leirvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3005 gr.

18. juni fingu Angelie og Sveinbjørn Poulsen, Vestmanna, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

21. juni fingu Birita og Regin Bláhamar, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3550 gr.

21. juni fingu Sigrid Olsen og Finn Christensen, Hósvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

22. juni fingu Anna Maria Troest og Rubek Lilaa, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4250 gr.

23. juni fingu Kristianna W. Poulsen og Eyðun R. Jensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4150 gr.

ANDLÁT

16. juni
Franklin Ziska, Klaksvík, 86 ár.

18. juni
Per Nyholm Debess,55 ár.

19. juni
Anna Sofia Joensen,vanliga nevnd Lillan, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Havn, 84 ár.
Lítla Vera Nýggjagarð, dóttir Matildu og Brian í Hvannasundi.
Amaliel Jensen, Sandur, 52 ár.

20. juni
Dánjal Martin Jahannesen, vanliga nevndur Dánjal á Torlabrúgv, ættður úr Haldórsvík, búsitandi í Vestmanna, 93 ár.

PRÓGV

Tórður Jóansson hevur tikið prógv í gudfrøði, BD, Bachelor of Divinity, á University of Glasgow

Fiskivinnuskúlin, Vestmanna:

10 næmingar fingið HIF-prógv

Hósdagin 24. juni 2004 fingu 10 næmingar á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna HIF-prógv (Hægri útbúgving innan fiskivinnu). Útbúgvingin tekur 3 ár

Frá vinstru: Jón Johansen, Ásmundur Hansen, Jens Michael Tróndheim, Sigurð Marner Simonsen, Levi Nybo, Dorit Simonsen, Lotte Skifte Thomsen, Senøva Johansen, Maiken Johannesen og Conny Simonsen.

Sigurð Marner Simonsen, Levi Nybo og Ásmundur Hansen, sum vunnu European Business Game kappingina millum miðnámsskúlar í Føroyum, skulu umboða Føroyar í European Businnes Game kappingini í Kekkia fyrst í juli, har teir bestu bólkarnir í fleiri evropeiskum londum fara at kappast um evropameistaraheitið.

Mynd: Terji Nielsen

Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum:

Tríggir verkfrøðingar handað BS-prógv

Mikudagin 23. juni 2004 fingu tríggir verkfrøðingar handað BS-prógv á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Talan er um tveir oljufrøðingar og ein elektroverkfrøðing.

Verkfrøðingaútbúgvingar nar á Fróðskaparsetrinum eru liður í miðvísu menningarætlanini hjá Fróðskaparsetrinum at menna og betra føroyskan førleika.

Nýggju oljuverkfrøðingarnir eru Heðin Abrahamsen og Halgir Arge, sum hava skrivað BS-ritgerð í felag um alisfrøðiligar parametrar í føroyskum basalti við støði í kjarnuboringini frá Vestmanna í 1980.

Nýggi elektroverkfrøðingurin er Viggo Johansen. Í BS-ritgerðini hevur hann kannað støði fyri at uppbyggja eina nýggja fartelefonskipan í Føroyum.

Viggo Johansen, Heðin ABrahamsen og Halgir Arge

Mynd: Jens Kristian Vang

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Adolf Ryggshamar 70 ár

Føðingardagsheilsan til mammubeiggjan Adolf Ryggshamar í Vági á 70 ára degnum 28. juni 2004

Jóansøkan verður hildin í Vági um vikuskiftið, og mánadagin 28. juni fyllir mammubeiggi mín Adolf Ryggshamar í Vági 70 ár.

Adolf er uppvaksin og búsitandi í Vági, og Vágsbygd hevur altíð staðið hansara hjarta nær. Tá ið ein er fyltur 70 ár, hevur ein sjálvsagt upplivað eitt sindur av hvørjum, bæði av góðum og ringum.

Adolf er næstelstur av einum barnaflokki uppá 5 systkin. Hann er sonur Jens og Alvildu Ryggshamar í Vági.

Adolf er giftur við Salomu, fødd Thomsen, ið er ættað av Kollafirði. Tey fingu 3 børn, Leivur, Margretu og Solveig.

Leivur og Solveig búgva í Vági, meðan Margreta slítur sínar skógvar í ættbygdini frá móðurs síðu í Kollafirði.

Adolf hevur tað mesta av sínu lívi verið sjómaður og fór fyrsta túrin til skips við ferðamannaskipinum »Dronning Alexandrine« í 1949, bert 15 ára gamal. Hann gekk somu leið sum Jens abbin, nevniliga innan kokkayrkið. Hann var tvey ár við »Dronning Alexandrine« og bæði árini var hann hjálparkokkur. Mangan hevur Alvilda omman umtalað tíðina tá ið Adolf fór sín fyrsta túr við »Dronningini Alexandrine«, og hvussu gott honum dámdi har umborð o.s.fr.

Hetta var sjálvsagt ein stór avbjóðing í hansara lívi, men Adolf helt áfram við at vera sjómaður. Hann fór m.a. við Garðasluppuni »Havgásini« til Grønland í 1952 við Mortan Jacobsen á Báraldarbakka úr Vági sum skipara.

Adolf hevur eisini verið við norska línuskipinum »Vartal« saman við pápa mínum og øðrum kendum vágbingum. Vartal brendi tíverri fyrst í 1970 unum, men hvørki Adolf ella pápi vóru við tann ólukkutúrin, har fleiri av manningini doyðu.

Adolf var eisini við »Norðheim« og »Mette Polaris«. Seinni var hann við »Sjófarinum«, sum Jógvan bróður hansara átti. Her var hann eisini saman við elsta bróðrinum Vilmund, sum eitt skifti førdi »Sjóðfarið«. Fyri at nevna nøkur onnur skip, sum Adolf hevur verið við, kann nevnast »Vágbingur« og »Jógvan á Gørðunum«. Adolf hevur eisini verið til útróður í Grøndlandi og róð út við familju útróðrarbátinum »Bresta« m.a. saman við pápa sínum í mong ár.

Fyrst í sjeytiárinum, legðist Adolf upp á land vegna sjúku. Hóast sjúku hevur Adolf havt hugin og áræði til mangt og hvat. Tað er ikki bara tilfeingið av havinum, sum hevur havt hansara áhuga, men eisini mangt annað.

Adolf gekk aðrar leiðir við at leiga gamla Klubban í Vági frá Pola og Petur Nolsø. Her hevði hann matstovu og bakarí. Har m.a. vinmaður og skyldmaður hansara Jonhard Vest Joensen var honum til hjálpar í bakaríinum, saman við nógvum øðrum góðum kreftum inni í matstovuni.

Matstovan var millum fólk flest kallað »Hjá Adolfi«. Har var m.a. fyrsta »Jukeboksin« í Suðuroy. Sum seinni varð seld til biografin hjá Jørgen M. Olsen í Vági.

Adolf keypti sær jørð í Vági í 50-unum. Har hevur hann saman við sínum seyðafylgi havt nógvar strævnar løtur, men fyri tað mesta góðar løtur. Eg minnist sjálvur sum smádrongur hvussu gott og hugnaligt tað var, at vera yviri á bønum hjá Adolf og Salomu, tá ið hoyggingin var fyri. Sjálvt um eg var meira til ónáðir enn til gavn, skeldaði Adolf meg ikki út.

Adolf er framvegis hvønn dag saman við sínum seyðafylgi á bønum við tí endamáli, at seyðakjøtið skal verða væl etandi til heystar.

Sum frítíðaritriv hevur Adolf havt kapproður og fótbólt sum ítriv. Hann var á besta líðnum hjá VB í 50-unum, m.a. saman við vinmonnum sínum Henry Hansen (Henry hjá Algatu) og Johan Toftum (Johan í Kálhaganum).

Besta úrsliti hjá Adolfi og teimum – sum er eri kunnaður um – má uttan iva vera tá hann var við at vinna 3 steyp á einari jóansøku á Tvøroyri. Hetta hendi miðskeiðis í 50-unum. Fyrst vann hann við Vágbingi í kapproðri og seinni sama dag, vann hann tvey steyp, ávíkavist á VB-liðnum og á einum felags Suðuroyarliði. Seinni sama dagin gekk leiðin burt at fiska við trolaranum Høvdaberg.

VB og fótbólt er Adolf framvegis sera glaður fyri. Hann er til hvønn heimadyst hjá VB. Tað er líka mikið, um tað er 1. deild ella smábørn sum spæla, so er Adolf á Eiðinum til fótbóltsdyst. Um vetrarnar er tað hondbólturin í hevur áhugan. Um VB ikki vinnur sínar dystir, so hevur dómarin ella okkurt annað skyldina, soleiðis er Adolf.

Adolf hevur altíð verið vágbingur við stóra V, og hann er sera góður við heimbygdina hjá sær. Adolf er sera fegin, táið okkurt gott hendur í bygdini m.a. í vinnulívinum, t.d. um eitt nýtt virki opnar ella eitt nýtt skip kemur til bygdina, so er Adolf glaður. Hinvegin gongur nakað galið, so er lagið minni gott hjá Adolf.

Kanska kunnu orðini hjá Neptum, lýsa og lætta honum um hjartað á 70 ára føðingardegnum: »Søgu ríka mín heimbygd hon eigur, megnarkvinnur og – menn føddust her, vunnu bygdini æru og heiður, gingu undan í verki manga ferð. Virkisfýsni fólkið merkir, standið saman tí kvinnur eins og menn, havið framtíðarhugsjónir sterkar, einaferð bygdin tá seg mennir enn.«

Adolf hevur altíð verði fittur og fyrikomandi at tosað við, og hann er sera fegin, um tað gongur gott hjá sínum børnum, abbabørnum og nærmastu familju. Hinuvegin er hann eisini altíð fyrikommandi og hjálpsamur, um onkur hevur onkran trupulleika at dragast við. Hann er altíð klárur at hjálpa.

Eg vil takka tær fyri nógvar góðar løtur saman við tær og ynskja tær hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 28. juni 2004 og ynskja tað besta fyri teg og tíni í framtíðini. At enda vil eg ynska tær og Leivi góðan túr á veg til Pólands og Danmarkar í vikuni.

Bestu ynskir
Systirsonur
av flatlondum

Olgar Hansen 65 ár

Í morgin fyllir Olgar Hansen í Klaksvík, Olgar hjá Ludda í Gøtu, 65 ár.

Olgar er føddur í Søldafirði, sonur Onnulenu Hansen, fødd Johannesen úr Søldafirði, og Petur Ludvig Hansen úr Norðragøtu. Luddi og Annalena fluttu til Klaksvíkar í 1949 og búsettust í Vági.

Í 1966 giftist Olgar við Onnu Kathrinu Jacobsen á Fløttinum í Klaksvík, rópt Liden, og tey eiga 3 børn, Marian, Samly og Hans Olgar. Abbabørnini eru 3 í tali, Annika, Tróndur og Olgar.

Kann minnast, sum 6 ára gamal, tá tey giftust. Tað var valár, og uppi á fjallinum stóð við ljósbókstavum, sum blunkaðu, »Velji Tjóveldið«. Seinni frættist, at tað var ljós frá einum privathúsi. Hjúnini vóru ósamd, konan sløkti og maðurin tendraði.

Olgar sigldi við Karinu á hemaraveiðu í New Foundlandi 1966.

Einaferð, teir høvdu sett línuna, kom eitt stórt ferðamanna skip, sum hevði kós beint gjøgnum línuna. Tá legði Karina fyri, og so var kalla á skipið, sum svaraði aftur á føroyskum. Tá var tað svágur Olgar, Árni Petersen, sum tá sigldi við Norska ferðamannaskipinum »Bergensfjord«.

Olgar sigldi hjá Føroya Bjór frá 1967 til 1987. Kann minnast, at tað var óføra stuttligt at koma til Klaksvíkar at ferðast hjá mammubeiggja og Liden. Tá slapp eg við Olgar til arbeiðis, sum var at koyra øl og sodavatn frá bryggjaríinum til bátin, »Ósa«, og seinni, »Viðoy«. Síðani var farið við bátinum til Suðuroyar, Sandoyar ella Havnar. Tá kundi man drekka so nógvar sodavatn, sum man orkaði. Og so at síggja allar dreingirnar, sum vóru á bryggjuni tá vit komu, fyri hjálpa til at fáa tómar fløskur umborð og fullar fløskur í land. Lønin var sodavatn - tað vóru dagar.

Olgar hevur siglt hjá Strandferðsluni síðan 1987, og tað kemur hann ivaleyst at gera til undirsjóartunnilin verður tikin í nýtslu, um heilsan verður.

Ein góðan dag vil eg ynskja tær og Harrans signing framyvir.

Brandur

Dagurin

26. juni. Pelagius, deyður umleið ár 925. Ein 10 ára gamal drongur, sum varð tikin av døgum, tá ið maurar ráddu í Spaniu.

27. juni. Sjey sovarar. Halgisøgan sigur frá, at tá ið keisarin Decius legði eftir teimum kristnu, leitaðu sjey ungir menn sær skjól í einum helli í fjøllunum. Hellið, teir krógvaðu seg í, varð funnið, og stórir steinar settir fyri inngongdina, so at teir skuldu svølta í hel. 200 ella 300 ár seinni vórðu steinarnir av tilvild veltir frá munnanum, og teir sjey vaknaðu við sítt fríska lív uttan at vita, hvussu leingi teir høvdu sovið.

28. juni. Eleonora. Nú á døgum stendur í álmanakkanum bara Karolina Amalia, sum er navnið á eini drotning, og sum er komið inn í álmanakkan, eftir at teir í 17. øld gjørdu av at seta føðingardagarnar hjá kongum og drotningum við dagarnar í álmanakkanum. Men henda Karolona Amalia er eingin halgikona heldur enn onnur kongilig. Fyrr stóð navnið *Eleonora*, men sat at siga vita vit einki um, hvør ið hon var.
Navnið er tað sama sum Helena.